## DAGSINS MEINING

# Bløðini restina av árinum

Jólini nærkast og tað fer so eisini at merkja bløðini, sum eftir eru.

Vit hava á hvørjum ári hesi seinastu árini gjørt rættiliga fitt burtur úr jólahaldi og jólatilfari sum heild. Og tað gera vit aftur í ár. Saman við vanliga vikuskiftisblaðnum, sum kemur út jólaaftan, verður eitt stórt jólablað við hópi av jolalesnaði og øðrum tilfari, sum er gott at hava til at taka allar jóladagarnar.

Millum jól og nýggjár koma vit út sum vant hvønn gerandisdag.

Í seinasta blaðnum fyri nýggjar verður tikið samanum tað, sum er farið fram í árinum. Tað verður á ítróttarøkinum men eisini innan samfelagsmál og annnað, sum hent er.

Tit, sum skulu hava tilfar og lýsingar í blaðið hesar seinastu útgávurnar fyri nýggjár, latið okkum tað í góðari tíð.



**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Visiónsleys samanlegging

**Johan Petersen**

Avgjørt er nú, at ÚF og SvF skulu leggjast saman. Men tá ið einasta veruliga orsøkin er danofobi: ein barnslig roynd at forða føroyingum at síggja danskt sjónvarp, er spurningurin , um hetta ikki var betri ógjørt.

Løgtingið hevur - enntá við stórum meiriluta - viðtikið, at leggja ÚF og SvF saman (les: Svf undir ÚF). Hvørt mansbarn veit, at orsøkin til hetta er, at fyrrverandi SvF-stjórin Mikkjal Helmsdal í síni visión at menna eitt veruligt føroyskt sjónvarp, sá í eyguni, at hetta bert og best kundi gerast við at nýta alla fíggjarorkuna, sum SvF átti, til veruligt føroyskt sjónvarpstilfar, og so nýta restina av tíðini til beinleiðis at senda DR1 ella DR2.

DR 1 og 2 tilverugrundarlagið

Hetta eru tær sjónvarpsrásir, sum bæði síðan føroyskt sjónvarp sá dagsins ljós, hevur verið tilverugrundarlagið og tað, føroyingar vilja síggja. Hervið spardi SvF pening til óneyðuga banding, týðing, tekstíng, inntalu, arkivering, prográmmlegging, frammheinting og forskotna sending av tilfari, flestu føroyingar longu høvdu sætt. Og alt hetta tilfarið hevur at kalla verið ókeypis.

Men nú vann minnilutakenslan valdið og í reinum danofobiskum ørskapi avgjørdi mentamálaráðharrin, at leggja ÚF og SvF saman fyri at forða SvF at senda beinleiðis. Og fylgjan av hesum kann bert blíva, at tað fíggjarliga vælfunderaða ÚF yvirtekur tað veika. fíggjarliga kroysta SvF.

Skal als ikki siga, at tað undir ongum umstøðum vildi verið ráðiligt at lagt ÚF og SvF saman, men hetta skuldi sjálvandi verið gjørt grundað á visiónir um at menna báðar stovnarnar og í serdeilisheit fyri at menna SvF. Og hetta skuldi verið grundað á væl fyrireikað forarbeiði, soleiðis at veruligur vinningur fekst burtur úr eini samanlegging í staðin fyri sum nú, eini vón um vinning.

**Nær, Jógvan á Lakjuni, nær?**

Nei, Jógvan á Lakjuni, nógvar ferðir meiri umráðandi enn ein samanlegging er, at fáa lógloysið, ÚF og SvF virka undir, upp á pláss, við at fáa setta í gildi eina fjølmiðlaábyrgdarlóg, so at Petur, Virgar, Óli og undirritaði hava nakrar staðir at fara við okkara átalum, tá ið ÚF og SvF ikki kenna sær høgv. Uppskot um hesa lóg varð framlagt longu í 1998, men hevur hegnisliga verið skúgvað til viks av fullveldislandsstýrinum líka síðan. Nær, Jógvan á Lakjuni, nær fáa vit eina fjølmiðlaábyrgdarlóg???

# Tórsvøllur, Hoydalar og Hotel Føroyar?

**Hans Birgir Hansen**



Eg havi áður skrivað um Tórsvallarmálið og kundi gott hugsað mær økið antin uppi í Hoydølum, grasfløtan bleiv gjørd til nýggjan Tórsvøll ella økið norðanfyri Hotel Føroyar.

Tí so kundu vit tikið og flutt Tórsvøll úr Gundadali niðan í Hoydalar ella niðan til Hotel Føroyar. Kundi ein slík ætlan vunnið stóra undirtøku, kunna vit fyrireika flyting.

Eg kundi hugsað mær at landsdystirnir verða spældir inni á Svangaskarði meðan flytingin fer fram av Tórsvølli, antin niðan í Hoydalar ella niðan til Hotel Føroyar.

Og tá nýggjur studentaskúli verður bygdur úti við Marknagilsvegin tá kundi vit skipa Studentaskúlan í Hoydølum sum ítróttarháskúla at menna allan ítróttin.

Hvat siga ítróttarskrivarar og ítróttarfólk til slíka ætlan ið farast kann undir beinanvegin, vinnir ætlanin stóra undirtøku, kemur hendan at gagna øll ítróttarfeløg uppi í Gundadali.

Harafturat kunna allir borgarar í Tórshavnar kommunu, fáa atgongd til nýggja Stadion ella frælsan ítrótt, ið gevur øllum møguleikan at spáka, ella renna, runt um grasvøllin. Tá høvdu øll sloppið undan at spáka og renna úti í nógvu ferðsluni, ígjøgnum havnargøtur og vera luftdálkaði og fáa skaðiligu evnini anda niður í seg, ið setur gongd á sjúkurnar.

Skipa kappingar í frælsum ítrótti í føroyskum og í norðurlendskum og europeiskum høpi, kundu bæði heima og uttanlands skapt áhugan, at taka lut í slíkum kappingum.

Eg kundi hugsa mær at gomlu ÍSF húsini vestan fyri svimjihøllina blivu flutt eysturum ítróttarhøllina uppi á Nabb t.v.s. beint yvir av Berg Motor við parkeringsøkið.

Tað hevði verið uppá tíðina at fingið eitt kjak um slíka ætlan í eg her havi umrøtt, og avtøku av Tórsvallargrunni og nevnd, ongantíð ovskjótt og fáa stadion til frælsan ítrótt.

Grundøkið vestanfyri svimjihøllina, kundi verið grivið so mikið niður at Fótbólt Samband Føroyar kundi havt eina hædd undir jørð, og grundøkið kann víðkast norður eftir ídag.

Tá hetta arbeiðið var liðugt kundu vit fingið flutt FSF húsini av Tórsvølli niðan á hetta grundøkið, hvat sigur ÍSF til eina slíka ætlan, lat okkum fáa eitt kjak um hesa ætlan.

Tá kundu vit fingið Gundadal at blomsta sum ongantíð áður, og njóta eina Stadion til Frælsan Ítrótt, ið kann spara øllum borgarum í Tórshavnar kommunu heilsuútreiðslur.

Eg haldi ikki at fótbólturin einsamallur skal dominera her uppi í Gundadali, har øll hava tørv á grundvenjing, við atliti til øll ítróttarfeløg, ið halda til uppi í Gundadali.

Hetta kann eg venda aftur til, við hvøssum atfinningum at tykkum ið eru um Tórsvøllin og Fótbólt Samband Føroyar ið umboðar øll fótbóltsfeløgini í landinum í dag.

Tað er ikki rættvíst, at Tórsvøllurin skal vera stjórnaður av gomlum HV-arum, Poul Michelsen og Jógvan Páll Lassen ið eg áður fanst harðliga at í Tórsvallarmálinum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.